# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar



*Lucas Haahr Yri bleiv 21. november stóribeiggi hjá hesum fitta beiggjanum. Beiggin vigaði 3580 gram og var 53 cm langur. Foreldrini eru Hanne Maria og Karl Yri og búgva í Rødovre.*

11. november fingu Sofía og Jóhannes Poulsen, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 4000 gr.

18. november fingu Eva úr Dímun og Jógvan Jón Petersen, Dímun, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3100 gr.

18. november fingu Leila Lisberg og Elian H. Hansen, Vági, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4280 gr.

18. november fingu Heidi M. Johannesen og Esben Ditlevsen, Hedensted, ein son. Hann var 48 cm langur og vigaði 2686 gr.

19. november fingu Jana Ólavsdóttir og Henrik Weihe Joensen, Tórshavn, tvíburðar, dóttur og son. Tey vóru 46 cm long og vigaðu 1695 og 1870 gr.

20. november fingu Selma og Páll Augustinussen, Tórshavn, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4750 gr.

20. november fekk Magnus Dansson Olsen eina lítlasystur. Foreldrini eita Jannie og Dan Magnusson Olsen.

20. november fingu Frida Ellefsen, Miðvági, og Tummas Gudmundsen, Sandavági, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3850 gr.

21. november fingu Maiken og Sámal Richmond, Kollafirði, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3860 gr.

21. november fingu Karina Jacobsen og Ragnar P. Joensen, Signabø, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 4800 gr.

24. november fingu Ann Gvøðny og Johannes Ólavsson, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3810 gr. Hann eitur Ólavur Ólavsson.

24 november fingu Ann Ellefsen og Petur M. Petersen eina dóttir á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn. Hon var 49 cm long og vigaði 3.800 gr.

24. november fingu Thilda Joensen, Vági, og Nøkkvi Kristmannsson, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4050 gr.

25. november fingu Ann Winther Jensen og Finnur Sólbjørnssonur Olsen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 2750 gr.

26. november fingu Kára Joensen og Idar Lydersen, Klaksvík, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 2650 gr.

## Emil Thomsen fleiri rundar dagar í ár



27. november fylti Emil Thomsen bókaútgevari í Havn 88 ár. Hesin føðingardagurin verður vanliga ikki roknaður sum ein rundur føðingardagur, men í ár eru liðin 50 ár síðan Emil byrjaði sum sjálvstøðugur handilsmaður í 1953 og 35 ár síðan hann byrjaði sum bókaútgevari í 1968. Eisini er liðin 25 ár síðan hann bleiv kosin heiðursdoktari við lærda háskúlan í Lund í Svøríki. Hetta hendi við eitt stórt hátíðarhald 2. juni 1978.

Emil er føddur 27. november 1915 á Tvøroyri. Foreldrini vóru Nicolina, f. Niclassen, og Mads Thomsen, fiskiskipari.

Sum ungur tók hann hann preliminerprógv og handelsmedhjælpereksamen, sum tað kallaðist tá. Undir krígnum arbeiddi hann í Danmark..

Í 1953 byrjaði hann við egnari heilsølu og í 1955 fekk hann einkarumboð fyri svensku Elektrolux el- og hvítvørurnar. Hann hevði stóran handil í Bókbindaragøtu til 1985, tá hann lat Elektrolux umboðið til P/F Leif Mohr.

Í 1968 byrjaði Emil sum bókaútgevari og stovnaði bókaringin *Bókagarður*. Hann hevur gjørt eitt stórt slóbrótandi arbeið við at endurprenta og útgeva hópin av bókum og tíðarritum sum t.d. øll bindini av tíðarritinum Varðanum. Eisini hevur hann givið út tíðarritið *Faroe Isles Review* og *Bókatíðindi*.

Fyri síni mentanarligu avrik sum bókaútgevari hevur hann fingið fleiri heiðurslønir, hann bleiv t.d. útnevndur Fil. Dr. h.c.við lærda háskúlan í Lund í 1978 og fekk heiðursløn frá universitetinum Helsingfors í 1981.

## Niclas Akraberg Poulsen 70 ár



Mánadagin 1. desember fyllir Niclas Akraberg Poulsen í Porkeri 70 ár.

Niclas er føddur og uppvaksin í Akrabyrgi. Foreldrini vóru, Mia, f. Poulsen, og Niclas Poulsen, fýrmeistari, bæði úr Sumba.

Sum ungur fór Niclas í læru sum maskinsmiður á hvalastøðini í Lopra, men mátti gevast tá støðin bleiv niðurløgd. Hann arbeiddi síðan í nøkur ár sum vitapassari í Akrabyrgi, til hann í 1959 fór í læru sum politistur. Hann byrjaði á politistøðini í Klaksvík 1. juni 1959 og fór seinni hetta árið til Danmarkar á politiskúla.

Eftir lokna útbúgving í 1961-1965 varð hann settur sum politistur í Klaksvík. Frá februar 1965 til 1970 var hann politistur í Runavík. 1. februar 1970 varð hann settur sum støðleiðari í Klaksvík. Har var hann, til hann 15. august 1975 varð settur varaleiðari fyri støðleiðaran í Havn.

1. oktober 1988 varð hann settur sum føroya fyrsti politiinspektørur, leiðari fyri alt politiið í Føroyum, næstur fútanum. Hetta starv røkti Niclas til hann fór frá fyri aldur í 1997, 63 ára gamal.

Niclas giftist í 1956 við Onnu, f. Sundberg, úr Porkeri. Tey eiga fýra børn: Bjarma sum býr í Klaksvík, Niels Juul, sum býr í Runavík, Bjørg, sum býr í Havn, og Niclas, sum býr í Vági.

Tá Niclas gavst sum politiinspektørur, flutti hann saman við konuni til Porkeris at búgva. Hann hevur øll árini havt eina trøð og seyðir í Akrabyrgi, so nú býr hann høgligari fyri til at passa síni áhugamál í Akrabyrgi. Hann er formaður í pensionistafelagnum í Suðuroyar sunnaru helvt og næstformaður í Landsfelag Pensionista. Hann nýtur eisini at brúka síni handaligu evnir við at ganga á kvøldskúla í smíð, og viðhvørt undirvísir hann eisini í smíð.

## Kristiliga Sangkórið 50 ár



Í ár eru 50 ár síðan Kristiliga Sangkórið varð stovnað. Í hesum sambandi hevur kórið jubileumskonsert í Norðurlandahúsinum tann 29. november kl. 18 við fjølbroyttari skrá.

Kórið var í juni mánað uttanlands á sangferð. Tey sungu í dómkirkjuni í Roskilde, í Lund dómkirkju og í Oslo dómkirkju, umframt aðrastaðni, t.d. í Føroyahúsinum í Keypmannahavn.

Sunnudagin 7. desember syngur kórið til gudstænastuna í kirkjuni í Hesti og sama kvøldið verður sungið í Kirkjubøar kirkju. Tann 14. desember syngur kórið í Vesturkirkjuni og 22. desember í Havnar kirkju.

Fyrsti leiðarin hjá Kristiliga Sangkórinum í 1953 var Holger Borgen Hansen (nú Lindhardt), sum í dag er 87 ára gamal, hann kemur úr Danmark at vera við til konsertina tann 29. november, og skal hann stjórna tveimum av sangunum, sum verða sungnir.

Síðan kórið varð stovnað og fram til í dag hava verið fleiri kórleiðarar: Frank Reines, Alfred Dahl, Eilif Samuelsen, Jóannes Nolsøe, Knút Olsen, Kári Bæk, Bjarni Restorff, Pauli í Sandagerði, Inga Strøm og Hans Pauli Tórgarð.

Síðan september 1977 hevur Hanus Joensen , skúlastjóri, í Tórshavnar kommunuskúla, verið kórleiðari.

## Sangkvøld í róðrarneystinum á Glyvrum

TÍÐINDASKRIV

Leygarkvøldið 29. november kl. 20 verður sangkvøld í róðrarneystinum á Glyvrum, har dentur verður á andaligan felagsssang við harmoniku, gittara og øðrum ljóðførum. Eisini verða kaffi og køkur á skránni.

Stigtakararnir, Jóannes S. Hansen og Hallgrím Miðberg, siga, at hugskotið til hetta kvøldið kom á eini hjúnarlegu á Zarepta, har felagssangurin gekk so sera væl. Teir vóna at nógv fólk koma til tiltakið.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Eitt lív í ítrótti

**Í ár eru liðin 40 ár, síðani Sverre Midjord kom í stjórn Ítróttasambands Føroya, og hevur hann eisini í ár 25 ár á baki sum varaforseti ÍSF**



Tað eru nøkur fólk, ið seta sær varandi spor, líka mikið hvat tey so enn takast við. Ikki tí at tey hava ætlanir um at gera vart við seg sjálvi, men av tí at tey við eldhuga takast við ymiskt, ið hevur áhuga teirra. Hetta verður ofta so fastur og stórur partur av lívi teirra, at tey mangan gerast sammerkt við áhugamálini.

Ein av hesum persónum er Sverre Midjord.

Sverre hevur alla sína tíð verið aktivur á ymsum økjum, og álitisstørvini hava verið mong og krevjandi. Hóast aktivur í bæði lokal- og landspolitikki, ágrýtin samfelagskjakari, so er fremsta frítíðaráhugamálið hjá Sverra ítróttin. Ítróttin og ítróttararbeiði hava altíð verið fastgrógvnir partar av lívi hansara, og hevur hann verið virkin í fleiri ítróttagreinum. Sverre hevur m.a. roynt seg í bæði hond- og fótbólti, men tað er tó borðtennis, ið hevur fremsta áhuga hansara. Ikki er ov nógv sagt, at hann eigur sín stóra lut í, at hesi ítróttagrein hevur verið lív lagað í Føroyum. Sjálvur var hann ein teirra, ið legði lunnar undir føroyskt borðtennis, og framvegis er hann, hóast farin um tey sjeyti, aktivur spælari. Sum borðtennisspælari er Sverre besta tekin um, at aldurin er ikki nøkur forðan hjá tí, ið hevur hug og vilja at takast við ítrótt. Sverre hevur gjøgnum árini - heilt fram til í ár - vunnið hópin av FM og heiðursmerkjum í borðtennis, men minni kent er kanska, at hann eisini hevur verið føroyameistari í hondbólti við TB í 1953.

Sverre er tvøramaður av heilum huga - eingin ivi um tað. Eingin skal siga nakað um Tvøroyri, ið ikki hóvar honum, so er hann til reiðar at verja heimbýin á einhvønn hátt í orð og tal. Og ítróttafeløgini í heimbygdini hevur hann tænt væl. Borðtennisfelagið hevur hann stjórnað í fleiri umførum, og í TB hevur hann verið virkin. Hann var formaður í Tvøroyrar Bóltfelag frá 1970 til 1972, og var venjari hjá 1.deild árini 1968 til 1971. Annars virkaði hann eisini sum ungdómsvenjari innan felagið í mong ár.

Fyri onkran tykist alskur Sverra til heimstaðið nærkast reinum trábeitni, men tað er tó ikki trongskygni, ið hevur eyðkent Sverra. Hann hevur altíð verið til reiðar at tæna allari teirri føroysku ítróttafjøldini. Altíð til reiðar at taka eitt tak har brúk hevur verið fyri tí, og er tað serliga á fyriskipanaðarliga økinum, at hann hevur gjørt vart við seg innan landsítrótt. Meira enn hálvan mansaldur hevur hann verið virkin í ÍSF, og fyrsta desember eru liðin fjøruti ár síðani Sverre á fyrsta sinni kom í stjórn Ítróttasambands Føroya. Samstundis kann Sverre í ár eisini hátíðarhalda 25 ára starvsdag sín, sum varaforseti ÍSF.

Í starvstíð síni í ÍSF hevur Sverre upplivað og verið partur av nógvum broytingum. Drúgvu ársaðalfundirnar, ið kundu vara fleiri dagar, tí hvørt smámál skuldi viðgerast á sjálvum aðalfundinum. Hetta tí at einstøku ítróttagreinarnar lógu beinleiðis undir ÍSF, og ósemjur um kappingarmál tí eisini vórðu løgd fyri aðalfund ÍSF til viðgerðar. Síðani deildarskipanina, tá skift varð sundur í deildir, ið tóku sær av ymsu ítróttagreinunum. Og so seinni aftur sersambondini, sum nú taka sær av egnum ítróttagreinum.

Menningin innan ítróttina hevur hesi ár verið stór. Talið av ítróttagreinum er økt munandi, og meira enn helmingurin av sersambondunum eru sjálvstøðugir limir í altjóða og millumtjóða ítróttasamgongum. Stórur dentur hevur verið lagdur á at geva føroyingum høvi at vera við í millumlanda kappingum, og er ítrótt eisini vorðin fast integreraður partur í føroyska gerandisdegnum. Nú eru ítróttakappingar alt árið, og umstøðurnar at íðka ítrótt eru góðar. Ítróttahallir og ítróttavøllir av ymsum slag eru at finna um alt landið, og onkursvegna eru nærum allir føroyingar á einhvønn hátt knýttir at ítróttini. Talið av íðkandi er nú oman fyri 15.000.

Alla hesa broyting, ið er hend innan føroyska ítróttaheimin, hevur Sverre verið partur av og átt sín virkna lut í, og fyri trúgva og drúgva virkið sítt innan ÍSF hevur Sverre fingið øll tey heiðsursmerki, ið Ítróttasambandið gevur. Sverre hevur fingið silvur- og gullnál ÍSF umframt gullmerkið við bjálka. Eisini hevur hann fingið heiðurskross Ítróttasambandsins fyri arbeiði sítt til frama fyri føroysku ítróttafjøldina.

Ítróttarsamband Føroya heilsar við hesum oðrum Sverra Midjord á 40 ára starvsdegnum tann fyrsta desember. Hjartaliga tillukku og nógv góðynski fyri framtíðina.

Við ítróttarkvøðu

**Ítróttasamband Føroyar**
**Heðin Mortensen, forseti**



## Mamma og dóttir í Smiðjuni

Hósdagin 26. november lat ein framýning upp í Smiðjuni í Lítluvík. Tað eru tær báðar Meiling Wung-Sung og dóttirin Hannah Skarsholm sum sýna fram.

Hannah sýnir fram pigmentmálningar og vatnlitsmyndir, serliga eru tað myndir úr náttúruni.

Meiling hevur eina framsýning við ymiskum brúkslutum, sum hon m.a. hevur funnið úti i náttúruni. Nógvir av lutunum eru væl egnaðir sum jólaprýði.

Ein sera úhugaverd framsýning sum er opin til og við mikudagin í komandi viku.

Framsýningin er opin allar dagar frá 11-18, tó er opið sunnudagin frá 12-17.

### Andlát

20. november
Hertha Hansen, Sandavágur, 83 ár
23. november
Jóhanna Sofía Nybo,Viðareiði, vanliga nevnd Hanna, 79 ár
Jóannis Kristin Olsen,ættaður av Sandi búsitandi í Havn, 55 ár
24. november
Maria Waagstein Johansen, Tórshavn, 94 ár
Petur Z. Hentze, ættaður av Sandi, búsitandi í Havn, 60 ár
25. november
Karin Elisa Djurhuus, Neslíð Vágur, 77 ár
Elsebeth Maria Jespersen, ættað úr Porkeri, búsitandi á Tvøroyri, 79 ár
26. november
Anna Danielsen, fyrrverandi fyristøðukvinna á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, 89 ár

### Dora Joensen Húsar 40 ár



Sunnudagin 30. november fyllir Dora Joensen f. Lassen 40 ár. Dora er ættað sunnan úr Vági. Foreldrini eru Gretha, f. Hansen, og Pauli Lassen. Hon er nr. trý av einum syskinaflokki uppá seks.

Dora fór sum ung til Havnar, at arbeiða í húsplássi, har møtti hon Bjarta, sum er ættaður av Húsum, sonur Lenu og Jákup Monrad. Dora og Bjarti fluttu so til Húsar at búgva í 1988. Tey eiga trý børn, Jákup Pauli 15 ár, Sólbjørg Helena 13 ár, og Ragnar 10 ár.

Einasta handilin í Kalsoynni hevur Dora, umframt tað situr hon eisini í fleiri nevndum.

Dora eigur eitt stórt hjarta og er altíð klár at hjálpa. Hevur man Doru í familjuni ella sum vin so eigur man nógv.

### Dagurin

**29. november. Saturninus.** Fleiri halgimenni við hesum navni eru knýttir at degnum, men helst halda teir talan vera um fyrsta kristna biskupin í Toulouse í Fraklandi, sum varð tikin av døgum um leið ár 257. Á grøv hansara er umleið ár 1100 bygd prýðilig kirkja, sum í miðøld var nógv vitjað av pílagrímum.

**30. november. Andrasarmessa.** Um lærusveinin **Andrias** sigur apokrýfisk søgn, at hann, tá ið ápostlarnir skiltust, fór sum trúboðari til Grikkalands og um svartahavsleiðirnar. Hann noktaði fyri at tæna skurðgudunum og varð krossfestur. Krossurin hann varð hongdur á, var settur saman á skák, og ein tílíkur krossur hevur síðani verið róptur andrasarkrossur.

Á kirkjubøstólunum við træskurðinum av Andrasi er hann avmyndaður við hesum krossi. Andras hevur verið høgt mettur sum halgimenni t.d. í Russlandi og Skotlandi, og vit vita, at minningardagur hansara, 30. november, eisini hevur verið hildin í Føroyum. Navnið er grikskt og merkir *maður*.

**Desember**
12. mánaður í okkara álmanakka eitur sum 10. í gamla rómverska kalendaranum; *decem*, ið merkir 10.

**1. desember. Arnaldur.** Er eitt av teimum elstu nøvnunum í halgramanna tali, men tað er eitt sindur tvørligt at fáa skil á, hvør hesin Arnaldur hevur verið. Fleiri við sama navni verða nevndir, og teir flestu halda, at her verður sipað til ein franciskanaramunk, sum fór til Kina í 1303 sum trúboðari.

Navnið er gamalt týskt, sett saman av *arn*, sum merkir *ørn* og *wald*, ið merkir tað sama sum føroyska orðið *vald*, *hersi*.